# Vegleiðing

## til umsóknarblaðið (pappírsútgávuna) til miðnámsútbúgvingarnar 2017

| | |
|---|---|
| **Talgilt ella pappír** | Umsóknarblað til miðnámsskúla finst á heimasíðuni hjá Mentamálaráðnum: www.mmr.fo.<br>Til ber at søkja annahvørt við talgildum umsóknarblaðið ella við pappírsumsókn – ikki báðum!<br>Henda vegleiðingin er ætlað teimum, sum velja at søkja við pappírsumsókníni. Søkir tú talgilt, fært tú vegleiðing á skíggjanum. |
| **Útbúgvingarynski** | Á umsóknarblaðnum kanst tú raðfesta trý útbúgvingarynski. Umsóknarblaðið verður fylt út við spjaldrastavum og sent skúlanum, ið tú hevur sum 1. ynski. Bústaðurin hjá skúlanum stendur á síðu 8 í vegleiðingini.<br>Send ikki upprunaskjøl, men ístaðin ljóstøk og legg øll viðkomandi skjøl við umsókníni.<br>Tá skúlin hevur móttikið og skrásett umsóknina, fært tú váttan umvegis teldupost. |
| **Umsóknarfreist** | Umsóknarfreistin er **15. mars.** |
| **Persónsupplýsingar** | Skriva føðingardag/p-tal, brúkaramerki í First Class (um tú hevur fingið eitt), navn, bústað, telefonnummar, teldupostbústað í teigin ”Persónsupplýsingar“ á síðu 1 í umsóknarblaðnum.<br>Um tú hevur fingið brúkaramerki í First Class frá Námi, skalt tú skriva hetta í teigin ”Brúkaramerki í First Class”. Brúkaramerkið er samansett av forbókstøvum í for- og eftirnavni, føðingardegi, einum tilvildarligum bókstavi og einum tali – ólíka hjá mannfólki, líka hjá konufólki. Dømi: hj2106f9 = Hans Jacobsen føddur 21/6.<br>Gev gætur, at p-tal skal upplýsast! |
| **Foreldur/verji** | Ert tú undir 18 ár, skal navnið á foreldrum/verja skrivast í teigin ”Upplýsingar um foreldur/verja“ á síðu 1 í umsóknarblaðnum, og tey skulu skriva undir niðast á síðuni í teiginum ”Undirskriftir“. |
| **Fortreytir fyri upptøku** | Tú skalt útfylla teigin „Fortreytir fyri upptøku“ á síðu 1 í umsóknarblaðnum eftir hesum leisti:<br>• Gongur tú í 9. flokki, skal váttað ljóstak av seinastu støðumetum frá 9. flokki leggjast hjá.<br>• Gongur tú í 10. flokki, skal váttað ljóstak av 9. floks prógvi og av seinastu støðumetum frá 10. flokki leggjast hjá.<br>• Hevur tú lokið 9. og/ella 10. flokk, skal váttað ljóstak av 9. og/ella av 10. floks prógvi leggjast hjá.<br>• Hevur tú staðið eina støðisútbúgving, skal prógv fyri lokna støðisútbúgving leggjast hjá.<br>• Hevur tú lokið miðnámsútbúgving, skal prógv fyri lokna miðnámsútbúgving leggjast hjá. |
| **Raðfesting og ferðakort** | Í teiginum ”Raðfesting og ferðakort“ á síðu 2 í umsóknarblaðnum raðfestir tú tíni útbúgvingarynski. Allar útbúgvingarnar hava eitt frámerki (**1A**, **1D**, **2A** o.s.fr.), sum tú finnur í talvuni á síðu 2 í umsóknarblaðnum og á síðu 7 í hesi vegleiðing. Ansa eftir, at tú velur leiðir, lærugreinar o.a., har tað er tilskilað inni í umsóknarblaðnum.<br>Tú kanst søkja um ferðakort frá Strandfaraskipum Landsins við at seta kross í kassan við tekstinum “Eg søki um ferðakort”. Ferðakortið gevur tær rætt til at feraðast ókeypis við bygda- og oyggjarleiðum millum bústað tín og útbúgvingarstaðið. Ferðakortið verður útflýggjað fyrsta skúladag og kostar 50 kr. |
| **Námsfrøðiligur stuðul** | Teigurin ”Námsfrøðiligur stuðul” á síðu 2 í umsóknarblaðnum skal altíð fyllast út, eisini um svarið er “nei”. Endamálið er at geva skúlanum møguleika at veita hjálp til næmingar, ið hava tørv á hesum beinanvegin. Talan kann verða um likamligar, sálarligar ella aðrar trupulleikar so sum lesi- og skrivitrupulleikar, ið kunnu hava týdning fyri skúlagongdina.<br>Gev gætur, at hetta ikki ávirkar tínar møguleikar at verða tikin inn, og at allar upplýsingar verða viðgjørdar í trúnaði. Um svarað verður “ja”, verður greitt nærri frá hesum í teiginum ”Aðrar viðmerkingar” á síðu 7 í umsóknarblaðnum ella við at venda sær til lestrarvegleiðingina í skúlanum. |

| | |
|---|---|
| **Undirskriftir** | Minst til at skriva undir í teiginum ”Undirskriftir“ á síðu 2 í umsóknarblaðnum. Ert tú undir 18 ár, skulu foreldur/verji eisini skriva undir. |
| **Umsøkjarar uttanlands** | Gongur tú í 10. flokki uttanlands, skulu váttað ljóstøk av 9. floks prógvi og av seinastu støðumetum frá 10. flokki leggjast hjá.<br><br>Um tú sjálv/sjálvur ert burturstødd/burturstaddur, kann annað av foreldrunum ella verji skriva undir fyri teg. |
| **Fyrivarni** | Møguligar broytingar í undirvísingarverkinum kunnu hava ávirkan á upptøku. Stovnan av leiðum og vallærugreinabólkum er treytað av nóg stórari undirtøku. Fyrivarni verður tikið fyri hesum. |
| **Spurningar** | Hevur tú spurningar um umsóknarblaðið, kanst tú venda tær til skúlan. Sí búðstaðir o.a. á s. 8 í hesi vegleiðing. |

## Gymnasialar miðnámsútbúgvingar

Gymnasialu miðnámsútbúgvingarnar eru lýstar í faldaranum ”Gymnasialar útbúgvingar”, sum fæst frá framhaldsdeildunum ella frá miðnámsskúlunum. Gymnasiala skipanin er eisini lýst á breytaportalinum: www.breyt.net

| | |
|---|---|
| **Upptøkuøki** | **Gymnasialu útbúgvingarnar** eru skipaðar í tvey upptøkuøki, norðurøkið og suðurøkið.<br>Norðurøkið fevnir um Norðoyggjar, Eysturoy og alla Sunda Kommunu. Suðurøkið fevnir um restina av landinum. Umsøkjari verður tikin inn á útbúgving í tí øki, har hann er heimahoyrandi sambært fólkayvirlitinum. Í teimum førum útbúgvingin bert finst í øðrum upptøkuøkinum, verða Føroyar roknaðar sum *eitt* upptøkuøki.<br>Upptøkuøkini eru ikki galdandi fyri tær vinnurættaðu miðnámsútbúgvingarnar. Føroyar verða tá roknaðar sum eitt upptøkuøki. |
| **Almennar**<br>**Upptøkutreytir** | Almennar upptøkutreytir eru:<br>• at tú hevur fullført 9. flokk fólkaskúlans ella hevur samsvarandi útbúgving frá øðrum lærustovni.<br>• at tú hevur lokið kravdu próvtøkur fólkaskúlans í 9. flokki í skrivligum føroyskum, donskum, enskum og rokning/støddfrøði.<br>• at tú hevur lokið tær munnligu próvtøkur fólkaskúlans í 9. flokki, sum Mentamálaráðið hevur tikið út.<br>Treytin er harumframt, at tú hevur lokið omanfyri nevndu royndir við nóg góðum úrsliti, og at tú ert førur fyri at fylgja undirvísingini á nøktandi hátt. |
| **Búskaparbreyt I** | Velur tú **Búskaparbreyt I á Kambsdali** (**1A**) ella **Búskaparbreyt I í Tórshavn** (**1D**), skalt tú velja eina lærugrein.<br>Fyri at velja ávíst **framhaldsmál** á búskaparbreytini, skalt tú hava fingið royndarfyrireikandi undirvísing í minsta lagi 2 ár í nevnda framhaldsmáli. |
| **Búskaparbreyt II** | Búskaparbreyt II er 2 ára gongd, har byrjað verður á øðrum ári á búskaparbreytini.<br>Velur tú **Búskaparbreyt II á Kambsdali** (**2A**) ella **Búskaparbreyt II í Tórshavn** (**2D**) fer val av lærugreinum fram aftaná upptøku.<br>*Upptøkutreytir*: Fyri at verða tikin inn á Búskaparbreyt II, skalt tú hava fortreytir svarandi til C-stigsførleika fyrsta árið á Búskaparbreyt I og annars vera før/-ur fyri at fylgja undirvísingini á nøktandi hátt.<br>Hevur tú arbeiðsroyndir, sum tú vilt hava við í viðgerðina av umsóknini, skalt tú lýsa hesar í teiginum ”Møguligar starvsroyndir“ á síðu 8 í umsóknarblaðnum og annars leggja viðkomandi skjøl við. |
| **Hægri handilsprógv** | Hægri handilsprógv tekur 1 ár og er búskaparligt ískoyti til aðra gymnasiala ella samsvarandi útbúgving. Hægri Handilsprógv verður boðið út í Tórshavn (**3D**).<br>*Upptøkutreytir*: Tú skalt hava lokið gymnasiala ella samsvarandi útbúgving við nóg góðum úrsliti. |
| **Fyrireikingarbreyt** | Fyri at verða tikin inn á fyrireikingarbreytina, skalt tú vera fylt/-ur **18 ár** í seinasta lagi 31. desember tað árið, undirvísingin byrjar.<br>Fyrireikingarbreytin verður boðin út á Kambsdali (**4A**), í Klaksvík (**4B**) og í Tórshavn (**4D**). Fyrireikingarbreytin tekur 2 ár.<br>Velur tú **Fyrireikingarbreyt á Kambsdali** (**4A**), fer val av lærugreinum fram aftaná upptøku.<br>Velur tú **Fyrireikingarbreyt í Klaksvík** (**4B**) ella **Fyrireikingarbreyt í Tórshavn** (**4D**), skalt tú velja eina lærugrein úr hvørjum bólki. |

| | |
|---|---|
| **Hugbreyt** | Velur tú **Hugbreytina á Kambsdali** (**5A**) **ella í Suðuroy** (**5C**), skalt tú velja eina lærugrein úr hvørjum bólki. Til ber ikki at velja sama mál á B- og A-stigi. Um tú t.d. velur Franskt B í einum bólki, kanst tú ikki velja Fransk A í hinum bólkinum.<br><br>Velur tú **Hugbreytina í Tórshavn** (**5D**), skalt tú raðfesta tvær leiðir og velja eina lærugrein úr hvørjum bólki. Velur tú Listaleið, skalt tú velja tvær listalærugreinar í ovasta bólki.<br><br>Fyri at velja ávíst **framhaldsmál** á hugbreytini, skalt tú hava fingið royndarfyrireikandi undirvísing í minsta lagi 2 ár í nevnda framhaldsmáli. Hugbreytin tekur 3 ár. |
| **Náttúrubreyt** | Velur tú **Náttúrubreytina á Kambsdali** (**6A**) ella í **Suðuroy** (**6C**), skalt tú velja eina lærugrein.<br><br>Velur tú **Náttúrubreytina í Tórshavn** (**6D**), skalt tú raðfesta tvær leiðir og velja eina lærugrein fyri hvørja raðfestu leið.<br><br>Fyri at verða tikin inn á náttúrubreytina, skalt tú hava fingið royndarfyrireikandi undirvísing í minsta lagi 2 ár í **alis-/evnafrøði.** Náttúrubreytin tekur 3 ár. |
| **Tilfeingisbreyt** | Fyri at verða tikin inn á Tilfeingisbreytina (**7E**), skalt tú hava fingið royndarfyrireikandi undirvísing í minsta lagi 2 ár í **alis-/evnafrøði**. Tilfeingisbreytin tekur 3 ár. |
| **Tøknibreyt** | Fyri at verða tikin inn á Tøknibreytina (**8B**), skalt tú hava fingið royndarfyrireikandi undirvísing í minsta lagi 2 ár í **alis-/evnafrøði**. Tøknibreytin tekur 3 ár. |
| **Autismuflokkur** | **Autismuflokkur** (**9D**) er ætlaður næmingum innan fyri autismuøkið, har undirvísing og hentleikar eru lagað til tørvin hjá einstaka næminginum. Næmingum standa í boði lærugreinar úr hugbreytini ella náttúrubreytini, treytað av ynskjum og førleikum teirra. Val av lærugreinum fer fram aftan á upptøku. Útbúgvingin endar við vanligum prógvi á gymnasialum stigi.<br><br>Útbúgvingin tekur 4 ár. |
| **Meira at vita** | Meira fæst at vita um útbúgvingar við at venda sær til skúlan. Sí búðstaðir o.a. á síðu 8. |

## Yrkisnám (vinnurættaðar miðnámsútbúgvingar)

Yrkisútbúgvingarskipanin er lýst í faldaranum “Vel tína yrkisleið”, sum fæst frá Yrkisdeplinum (www.yrkisdepilin.fo), framhaldsdeildunum ella frá miðnámsskúlunum.

| | |
|---|---|
| **Yrkisnám FHS** | FHS er stytting fyri Støðisútbúgving innan Fyrisitingar-, Handils- og Skrivstovuøkið. FHS verður boðið út á Kambsdali (**10A**), í Suðuroy (**10C**) og í Tórshavn (**10D**).<br><br>Velur tú FHS í Tórshavn ella í Suðuroy:<br>1) vel tríggjar lærugreinar, um tú ikki velur støddfrøði<br>2) vel tvær lærugreinir, um støddfrøði er onnur.<br><br>Velur tú FHS á Kambsdali, fer val av lærugreinum fram aftaná upptøku.<br><br>*Upptøkutreytir:* Lokið fráfaringarroynd fólkaskúlans (9. flokk) við nóg góðum úrsliti ella samsvarandi kunnleikastøði. FHS-útbúgvingin tekur 1 ár, og gevur møguleika til at søkja um framhald á Búskaparbrreyt II. |
| **Miðnám fyrireiking** | Miðnám fyrireiking er fyrireikingarár til yrkisnám og vendir sær til teirra, sum ikki lúka krøvini til upptøku á miðnámi, og tí hava tørv á einum fyrireikingarárið.<br><br>Miðnám fyrireiking verður boðið út í Tórshavn (**11D**). Val av lærugreinum fram aftaná upptøku.<br><br>*Upptøkutreytir:* Lokið fráfaringarroynd fólkaskúlans (9. flokk) ella samsvarandi kunnleikastøði. |
| **Yrkisnám Tøkni I** | Yrkisnám Tøkni I er fyrsta skúlaskeiðið í eini yrkisbreyt. Fyrsta skúlaskeiðið tekur ½ ár. Stendur tú fyrsta skúlaskeiðið, kanst tú halda fram á 2. skúlaskeiði, ið eisini tekur ½ ár.<br><br>Yrkisnám Tøkni I verður boðið út í Klaksvík (**12B**) og í Tórshavn (**12D**).<br><br>*Upptøkutreytir:* Lokið fráfaringarroynd fólkaskúlans (9. flokk) við nóg góðum úrsliti ella samsvarandi kunnleikastøði. |
| **Yrkisnám Tøkni IV** | Yrkisnám Tøkni IV er fjórða skúlaskeiðið í yrkisnámsskipanini. Fjórða skúlaskeiðið tekur 1 ár.<br><br>Yrkisnám Tøkni IV verður boðið út í Klaksvík (**13B**) og í Tórshavn (**13D**).<br><br>*Upptøkutreytir*: Staðið 2. skúlaskeið í tekniskum yrkisnámi ella SIT1 í ávísari yrkisbreyt. |
| **Yrkisnám Atstøði** | Yrkisnám Atstøði er støðisútbúgving, ið tekur 2 ár.<br><br>Yrkisnám Atstøði verður boðið út í Tórshavn (**14D**).<br><br>*Upptøkutreytir:* Lokið fráfaringarroynd fólkaskúlans (9. flokk) við nóg góðum úrsliti ella samsvarandi kunnleikastøði. |
| **Heilsuhjálpari** | *Upptøkutreytir*: 10. flokkur ella 9. flokkur og eitt ára arbeiðsroyndir.<br><br>Velur tú heilsuhjálparaútbúgvingina, skalt tú í teiginum ”aðrar viðmerkingar” á síðu 8 í umsóknarblaðnum greiða frá, hví tú søkir inn á hesa útbúgving, og hvørjar tankar tú hevur gjørt tær um at arbeiða við fólki.<br><br>Heilsuhjálparaútbúgvingin verður boðin út í Suðuroy (**15C**). |
| **Meira at vita** | Meira fæst at vita um útbúgvingarnar við at venda sær til skúlan. Sí bústaðir o.a. á síðu 8. |

# Serliga skipað miðnám

Serliga skipað miðnám eru útbúgvingartilboð, sum venda sær til ung, sum ikki kenna seg føran fyri at taka eina miðnámsútbúgving eftir vanligum treytum.

| | |
|---|---|
| **Serbreytir** | Serbreytir verða bodnar á tveimum støðum: í Miðnámi á Kambsdali (**16A**) og í Tekniska skúla í Klaksvík (**16B**). Avmarkað pláss eru á serbreytunum.<br><br>Í Tekniska skúla í Klaksvík (**16B**) kanst tú velja millum Timburbreyt og Matvørubreyt.<br><br>Serbreytirnar eru ætlaðar næmingum, sum ikki megna miðnám undir vanligum treytum. Undirvísingin byggir á læruætlan, sum er gjørd til einstaka næmingin. Næmingum standa í boði at menna sosialar, yrkisligar og persónligar førleikar, treytað av førleikum og tørvi teirra.<br><br>Almennu upptøkutreytirnar eru ikki galdandi. Ein upptøkubólkur stendur fyri upptøkuni, og umsøkjarar vera bodnir til upptøkusamrøðu.<br><br>Serbreytin endar við serstøkum prógvi, sum byggir á OCN-skipanina, sum er lýst í *Tilmæli um serliga skipað miðnám sum heildartilboð til ung við serligum tørvi*. Undirvísing og hentleikar eru lagað til tørvin hjá einstaka næminginum. Val av lærugreinum og skipan av læruætlan fer fram aftaná upptøku.<br><br>Fyri at kunna veita best møguligan stuðul til einstaka næmingin, er umráðandi, at øll viðkomandi skjøl, so sum sernáms- og sálarfrøðiligar frágreiðingar, eru løgd við umsóknini.<br><br>Serbreytin verður samskipað við stuðulstilboðum og/ella bú- og frítíðartilboðum. Biðið verður um at tilskila í umsóknarblaðnum, um tú loyvir skúlanum at viðgera umsóknina saman við Almannaverkinum og Sernámi. |
| **Meira at vita** | Meira fæst at vita um útbúgvingarnar við at venda sær til skúlan. Sí bústaðir o.a. á síðu 8. |

# Útbúgvingar og frámerki

Hvør útbúgving og hvørt stað (skúli) hevur sítt frámerki. Velur tú til dømis Yrkisnám Tøkni I í Klaksvík sum títt 1. ynski, skalt tú skriva **12B** inn í teigin “1. ynski” á síðu 2 í umsóknarblaðnum. Minst til at útfylla restina av umsóknarblaðnum.

| | | | A Kambsdalur | B Klaksvík | C Suðuroy | D Tórshavn | E Vestmanna |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| **Gymnasialar miðnámsútbúgvingar** | 1 | Búskaparbreyt I | 1A | | | 1D | |
| | 2 | Búskaparbreyt II | 2A | | | 2D | |
| | 3 | Hægri Handilsprógv | | | | 3D | |
| | 4 | Fyrireikingarbreyt | 4A | 4B | | 4D | |
| | 5 | Hugbreyt | 5A | | 5C | 5D | |
| | 6 | Náttúrubreyt | 6A | | 6C | 6D | |
| | 7 | Tilfeingisbreyt | | | | | 7E |
| | 8 | Tøknibreyt | | 8B | | | |
| | 9 | Autismuflokkur | | | | 9D | |
| **Vinnurættaðar miðnámsútbúgvingar** | 10 | Yrkisnám FHS | 10A | | 10C | 10D | |
| | 11 | Yrkisnám fyrireiking | | | | 11D | |
| | 12 | Yrkisnám Tøkni I | | 12B | | 12D | |
| | 13 | Yrkisnám Tøkni IV | | 13B | | 13D | |
| | 14 | Yrkisnám Atstøði | | | | 14D | |
| | 15 | Heilsuhjálpari | | | 15C | | |
| **Serliga skipað miðnám** | 16 | Serbreytir | 16A | 16B | | | |

# Útbúgvingarstovnar

| | | |
|---|---|---|
| **Miðnám á Kambsdali**<br><br>**Útbúgvingar: 1A, 2A, 4A, 5A, 6A og 10A** | Kambsdalur<br>Dalsvegur 1<br>530 Fuglafjørður | tlf. 610800<br>T-postur: kambsdalur@skulin.fo<br>Heimasíða: www.kambsdalur.fo |
| **Klaksvíkar HF-skeið**<br><br>Útbúgvingar: **4B** | Klaksvíksvegur 60<br>700 Klaksvík | tlf. 456412<br>T-postur: klhf@skulin.fo<br>Heimasíða: www.klhf.fo |
| **Tekniski Skúlin í Klaksvík**<br><br>Útbúgvingar: **8B**, **12B** og **13B** | Heygavegur 1A<br>Postrúm 20<br>710 Klaksvík | tlf. 456311<br><br>Heimasíða: www.tsk.fo |
| **Miðnámsskúlin í Suðuroy**<br><br>Útbúgvingar: **5C**, **6C** og **10C** | Grønudalur 2<br>950 Porkeri | tlf. 614201<br><br>Heimasíða: www.midnam.fo |
| **Heilsuskúli Føroya**<br><br>Útbúgvingar: **15C** | Grønudalur 2<br>950 Porkeri | tlf: 614210<br>T-postur: heilsuskulin@skulin.fo<br>Heimasíða: www.heilsuskulin.fo |
| **Glasir**<br><br>*Marknagil*<br>Útbúgvingar: **2D**, **3D**, **9D** og **10D**<br><br>*Hoydalar*<br>Útbúgvingar: **1D**, **4D**, **5D**, og **6D**<br><br>*Smiðjugerði*<br>Útbúgvingar: **11D**, **12D**, **13D** og **14D** | <br><br>Janusargøta 2<br>Postrúm 177<br>110 Tórshavn<br><br>Sanatoriivegur 13<br>188 Hoyvík<br><br>Smiðjugerði 1<br>Postrúm 3239<br>110 Tórshavn | Heimasíða: www.glasir.fo<br><br>tlf. 317177<br>T-postur: postur@fh.fo<br><br>tlf. 360660<br>T-postur: skrivstovan@hoydalar.fo<br><br>tlf. 738050<br>T-postur: tst@skulin.fo |
| **Fiskivinnuskúlin í Vestmanna**<br><br>Útbúgvingar: **7E** | Fjarðarvegur 4<br>350 Vestmanna | tlf. 424573<br>T-postur: fiskvest@fiskvest.fo<br>Heimasíða: www.fiskvest.fo |